# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Kári Sólstein farin um tey trýati



Fríggjadagin 27.08.04 fyllir Kári Sólstein í Klaksvík 30 ár. Kári er sonur Katrin og Alexander Peter (Alex) Sólstein, fyrrv. skúlastjóra í Klaksvík. Hann er uppvaksin á Vágsheygnum í Klaksvík, og sum smádrongur var Kári sum flest aðrir drongir, spældi fótbólt, kowboy og bil. Sjálvdan var farið langt, eitt sindur heimføðisligir hava teir verið, tí oftast vóru teir omanfyri „speglið" Her var býarmarki í teirra verð. Børnini spælt var við vóru m.a. Mouritz hjá Oslu hjá Mouritz hjá OyraKristoffir, Linda hjá Ruth hjá Mariu, Fróði hjá Helenu hjá Jákup Paula hjá Dia hjá Davinu, Sjúrði systkinabarn hansara, Luddi hjá Helga hjá Mariu Laksafoss.

Eftir loknað skúlagongd í fólkaskúlanum fór hann til Gøtugjógv og tók studentsprógv. Seinasta árið í studentaskúlanum tók hann, í tí tá spildur nýggja skúlanum á Kambsdali. Kári fór 20 ára gamal at tæna, sum húskallur. Hetta var í ísrelsku kibbutz bygdini Yad Hannah.

Undirhaldsvirksemið hevur altíð havt stóran áhuga hjá hesum manninum, og ofta er hann at hoyra og síggja til mong tiltøk sum vertur, frásøgufólk, osv. Sjónleikari er hann framúrgóður, tað hevur hann víst í verki millum annað við Klaksvíkar Sjónleikarafelag. Eins og flestu í familiu hansara hevur hann eisini tónlistarligar gávur, og hann hevur millum annað spælt við Klaksvíkar Hornorkestri.

Mangan stuttligan túr hevur hann verið innanlanda og uttanlanda, oftast saman við Øssur hjá Eigil hjá Eydnu hjá Kristinu hja Skard, Petur hjá Hildugunn, Sjúrði hjá Borgu o.ø. Hvat hesir kundu finna uppá saman, var ikki at vita, oftast høvdu teir tað øðiliga stuttligt. Einaferð var hann í ferð við at ræna Unibank í Lemvig. Íklæddur víkingaklæðir, træsvør og skjøldur, var biðið um "alle pengene" - tvey sekund gingu so vóru øll í skelli láturi, ið inni vóru. Slíkar beistagerðir vóru/-eru hansara "speciali"

Kári er best kendur sum ÚF vertur í barnasendingum og Barometrinum. Maðurin sum kann finna uppá mangt og hvat í ÚF, hevur altíð havt áhuga fyri hesum arbeiðinum, og tí er hann komin á røttu hyll. Hvør minnist ikki "Gísmund" - hann fekk hvørt mansbarn at flenna. Áhugin at framleiða undirhald bleiv styrktur tá Kári var á miðlaskúla í Danmark eftir loknað students útbúgving. Ávíst tilknýtið hevur hann eisini havt við Studio Pegasus

Eisini gekk hann í sporum faðir síns, tá hann valdi at fara í Læraraskúla. Fyrsta árið gekk hann í Danmark, men so slapp hann inn í Føroyum har hann eisini gjørdi seg lidnan. Eftir lokna útbúgving fór hann í starv hjá ÚF har hann hevur verið síðani. Tað segist, at hann hevði 10 túrakort við flogfarinum hjá Atlantic Airways tá hann gekk á læraraskúla í Danmark. Mamman skuldi havt keypt tað til hann, tí honum longdist so illa. Hetta bleiv tó ongantíð váttað.

Tær verður ynskt ein góðan føðingardag, við vón um bjarta framtíð.

**Heilsan**
**Skyldfólk á bygd**

## Minningarorð um Tummas Poulsen



Tummas fór frá okkum mánamorgunin, eg sá hann liggja í songini. Hann búði stutt á Eirargarði, flutti inn 1. juli.

Ólavsøkuaftan í ár fóru vit øll á Eirargarði í býin, seinni um kvøldið vóru vit í føðingardag hjá Sannu. Tummas snakkaði ikki nógv, sum hann plagdi, áðrenn hann bleiv sjúkur. Meðan hann búði á Eirargarði, kom hann ofta inn í stovuna og setti seg niður, fór síðan upp at ganga og steðgaði so á. Við hvørt kom hann inn í køkin, og fekk sær eitt málingarull at skriða sær við um ryggin.

Leygarkvøldið, áðrenn hann doyði, vóru vit øll ein gongutúr runt á økinum umkring Eirargarð, og samlaðust aftaná uppi á hjá Esbern til ein drekkamunn. Tummas sat við endan av borðinum, og fekk sær kaffi og ís við lagkøku saman við okkum. Tá hugsaði eg ikki, at hann tveir dagar seinni, fór at verða deyður. Tað er so løgið at hugsa sær.

Vit arbeiddu saman nógv ár á gamla verkstaðnum Vón, Tummas var altíð í so góðum lag, og dámdi so væl at syngja. Hann var í føðingardag hjá mær, tá eg fylti 30 ár, tá var hann ikki vorðin sjúkur. Tað árið Verkstaðurin brendi, vóru vit á summarlegu við Verkstaðnum í Frankaríkið. Tá vit koyrdu í bussi á ferðini, sang Tummas altíð tað fyrsta av sanginum From a Jack to a King. Eisini vóru vit á summarlegu við Frítíðarheiminum í Íslandi í 1999.

Eg haldi, at hann var byrjaður at verða sjúkur tá, tí hann datt mitt í tí heila, og hann breyt eina tonn.

Eg minnist, at tá eg plagdi at tosa við Tummas, endaði hann altíð við at siga: "Heilsa Ólavi beiggja tínum", teir kendust frá fyrr av.

Hvíl í friði góði Tummas.

**Emma Vágoy**

## Til diamantbrúðarparið Hannefíu og John William Joensen




27. august 1944 giftust Hannefía og John William. Hon var dóttir Agnes og Oliver Emil Thomsen, vanliga nevndur Oliver í Gøtu.

Mamma er fødd úti í Lávíkunum 5. september 1922, har hon traðkaði sínar barnaskógvar. Í barnaskúlanum gekkst henni væl og tá realskúli varð settur á stovn um tað mundið tá hon var um at vera liðug at ganga í skúla, heppnaðist tað henni eisini at fáa realprógv og eina góða barlast við í lívinum.

Mamma arbeiddi ymiskt fyrifallandi tað tíðina hon gekk í skúla og tíðina aftaná. Arbeiðsgenta var hon hjá fastir síni Lenu hjá Óla Gaard, sum hon helt sera nógv av og eisini hjálpti hon Elini á støðini í Lávíkunum. Støðin var tá í húsunum hjá Elini (har Hjørdis Klein, sála seinni búði) og sostatt grannahús við húsini hjá abba.

Undir krígnum arbeiddi mamma á telefonstøðini, sum tá var bygd við Ósánna ella umleið har sparikassaútbygningurin oman ímóti ánni nú er. Hon hevur títt og ofta sagt frá um tilburðir í samband við telefonstøðina undir krígnum og tá bumbutíðin var uppá tað ringasta, passaði hon einsamøll støðini, tí øll vóru flýdd undan bumbuhóttan. Eftir kríggið syrgdi Janus Djurhuus, skald fyri, at mamma fekk eina lítla sømdargávu frá landsstýrinum fyri tænastuna undir krígnum.

Øll míni barnaár vóru sera trygg, tí eg, sum flestu á mínum aldri vóru so heppin at hava mammu heima við hús nærum hvønn dag, so hóast pápi var til skips, so var mamma altíð í køkinum at taka sær av mær og systkinum mínum.

Pápi er sum helst flest vita sonur Dáva í Gerðum, føddur 27. juli 1923, og er uppvaksin á Vágsheygnum. Eftir lokna skúlagongd, fór hann í læru á Varpinum hjá pábabeiggjanum Kjølbro. Í vígslubrævinum stendur tó "vognmand". Tað var tó soleiðis, at Óli beiggi hansara byrjaði taxakoyring og pápi og vinmenn koyrdu fyri Óla, til pápi sjálvur byrjaði at koyra taxakoyring. Men seint undir krígnum fór hann til skips og sigldi við eitt nú Dragabergi og Sjúrðarbergi fyrstu tíðina eg minnist. Seinast í 50-unum fór hann við Skálanes sum skipari og var skipari har, minniliga túrin tá Skálanes brendi í Grønlandi.

Í 1960 tóku Dávamenninir seg saman at byggja eitt flakavirki úti á vestursíðuni og har arbeiddu hann, Hans Jákup og Óli øll árini til teir seldu virkið. Eisini var hann við í rækjuskipinum Horizont, sum tó fekk sera stutta livitíð.

Nú tit bæði njóta tykkara lívskvøld, vil eg takka tykkum fyri tað tit hava verið fyri okkum systkinini og ynskja tykkum hjartaliga tillukku á diamantbrúdleypsdegnum.

**Heilsan**
**Oliver**

## Dagurin

27. august.Gebhardus, deyður í 995. Biskupur í Konstanz í Týsklandi, liggur grivin í kleysturkirkjuni har, sum hann sjálvur sigst at hava latið byggja.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Til minnis um vinmannin Regin Hansen



Tað var sera hugstoytt, tá ein vinmaður ringdi til mín tíðliga mánamorgunin tann 16. august, og bar mær tey tungu boðini um at Regin far farin frá okkum.

Hóast eg visti at Regin hevur verið heilsuveikur tey seinastu tvey árin, so varnaðist tað meg ikki at fáa hesi boðini. Eftir samrøðuna mátti eg seta meg stillan eina løtu, og staðfesta, at nú var aftur ein av mínum góðu og trúføstu vinum ikki meira.

Seinnapartin leygardagin sat Regin so lívsfróður inni í stovuni heima hjá sær sjálvum, tá hann byrjaði at føla seg illani til passar, og út á seinnapartin sunnudagin bleiv støðan so hættislig at hann bleiv fluttur á Landssjúkrahúsið, og áðrenn midnátt sunnukvøldi, andaðist hann stillisliga, 70 ára gamal. Hósdagin 12. august hevði hann verið á Eiði í 90 ára føðingardag hjá mostrini.

Regin var ættaður úr Nólsoy, fór sum flest allir unglingar tá í tíðini til skips, tá skúlatíðin var av, og sigldi hann bæði við sluppum og trolarum, eisini róðu hann út nøkur summar í Grønlandi.

Tá Regin hevði verið til skips í nøkur ár, gavst hann við sjólívinum, og fór undir timburarbeiðið saman við pápanum og beiggjanum, og er tað eisini frá tí tíðini sum timburmaður, at tey flestu kendu Regin.

Regin varð giftur við Oddfríð Wang úr Froðba, tey fingu trý børn, dóttrina Birgittu og synirnar Jóhan og Lauritz, og barnabørnini eru tvey.

Tá eg í 1971 skuldi fara undir at byggja hús í Havn, var tað tá mín góði vinur Skála Palli, sum gjøgnum son sín skaffaði mær tríggjar fittar og raskar nólsoyingar at byggja húsini. Hesir vóru Regin, beiggi hansara Eyðin og Jalgrím Jacobsen, sáli vanliga nevndur Jalli, allir tríggir tá ógiftir. Harafturat luttóku eisini í arbeiðinum pápi teirra Olevinus og svágurin Tummas, vanliga nevndur Tummas á Hólmi.

Betri vælgjørdari og fittar menn enn hesar fimm nólsoyingar kundi eg neyvan fáa til at smíða húsini, tað sum sermerkti teir allar var, hvussu lagaligir teir vóru í allar mátar, tá tað kom út ímóti endanum av arbeiðinum, tá innrættan skuldi gerast, og tá vit vildu hava veggir, skáp o.a. flutt og broytt, so var hetta ongantíð nakrar trupulleiki. Gloymi heldur ongantíð tær góðu og hugnaligur løtur vit mangan høvdu uppi við Hoyvíkstjørn meðan húsini stóðu í ger, tá var tað meira frítt enn tað er í dag, hús okkara og trý onnur stóðu tá í ger har um leiðir. Tað var mangan hugnaligt at fara framvið, og sita og nýta ein kaffimunn saman við hesum fimm hugnaligu og stuttligu nólsoyingum, sum altíð høvdu okkurt skemtiligt at bera fram.

Síðani gingu nøkur ár til eg ein vakran summardag í 1976 møtti Regin og Jalla á Kongabrúnni, og sjálvandi fullu vit í prát saman, eftir at vit ikki høvdu sást síðani húsini vóru bygd. Tá var Regin vorðin giftur og var eisini blivin pápi, og í prátinum fekk eg eisini at vita, at Regin hevði keypt grundstykkið uppi við Hoyvíkstjørn, beint eystanfyri húsini hjá okkum. Tá Regin síðani fór at byggja húsini seinast í sjeytiárinum, komi vit at síggjast meira, og við tíðini komu tøtt vinabond at verað knýtt millum heimið hjá Regin og Oddfríð í Fútalág 12 og heim okkara í Tjarnarlág 4.

Eg og Regin komu at hava eitt so tætt knýtt samstarv, at tað er trupult at útgreinað. Hvørja ferð tá eitt ella annað skuldi gerast heima hjá okkum ella hjá teimum, so hjálptu vit altíð hvørjum øðrum, og uppbygt bleiv eitt so stórt vinalag, álit og trúvirði millum okkum báðar, sum tað á nakran hátt kann gerast millum tveir persónar her á fold. Tá nakað stórt umvælingararbeiðið skuldi gerast, so varð farið oman til Regin, og hóast hann til tíðir tókst við okkurt arbeiðið og hevði nógv um at vera, so legði hann alt frá sær, og gav sær altíð stundir til mín.

Regin hevði tað best, tá hann hevði nógv um hendi av handaligum arbeiði at gera. Tað sum serliga sermerkti Regin var, at hann var av tí rættað gamla skúlanum, einki skuldi koyrast burtur, men nýtsla skuldi og kundi fáast burturúr øllum. Altíð til reiðar at veita eina hjálpandi hond, tá heitt varð á hann, og Regin hevði eisini tær ómetaligu góðu gávur, at hann var arbeiðssamur og brúkti skil og skynsemi við øllum, ið hann tókst við. Var hegnismaður burturav, dugdi alt og hevði skil fyri øllum handaligum arbeiðið, og var eina standandi at koma við góðum ráðum um alt.

Hann var framúr vælgjørdur í øllum tí, ið hann tókst við, gekk høgt uppí, at dagsins verk skuldi síggja gott út í fólksins eygum, tað vóru fá sum spurdu um hvussu skjótt arbeiðið varð gjørt, men at tað vóru fleiri sum eygleiddu hvussu arbeiðið varð gjørt. Regin hevði, frá skaparans hond, fingið tær góðu gávur, at hann var bæði treiskur og tolin, og kom hetta sostatt eisini at verað hansara stóra styrki ígjøgnum alt lívið, tí hvussu illani tað mangan gekk í hond, ja so gavst hann ikki, fyrr enn arbeiðið varð útint.

Tí varð tað eisini, ein vøkur løta í dómkirkjuni hósdagin 19. august við jarðarferðina hjá Regin, tá dómprósturin byrjaði talu sína við at endurtaka orðini í øðrum ørindi úr vakra sálminum hjá Linu Sandell, "Sum tín dagur skal tín styrki vera" og endurtók eisini somu orð úr 5. Mósebók, kapittul 33. Eftir prædikuna bleiv hesin sami sálmur hjá Linu Sandell: "Bert ein dag, eitt bil í senn eg fái" sungin við fullsettari dómkirkju. Trúgvi at øll tey mongu, sum vóru samlaði hendan dagin í dómkirkjuni, mundu verað samd um, at hendan jarðarferðin lýsti persónin Regin til fulnar.

Saknurin og tómrúmi í grannalagnum her í Tjarnarlág er stórt, nú eingin Regin er at síggja meira, tí her í gøtuni var hann ofta at síggja, og var blivin ein gøtumynd, men uppaftur størri er hetta hjá tykkum góða Oddfríð, Birgitta, Jóhan og Lauritz, sum mist hava ein góðan og trúfastan mann, pápa og abba, og sum eisini hevði so nógva umsorgan fyri tykkum øllum.

Tankarnir eru hjá tykkum øllum í hesi sorg tykkara, sum rakti tykkum so brádliga, við ynski um, at Harrin ríkliga skal signa og styrkja tykkum í sorgini.

Við hesum orðum vil eg lýsa frið og æru yvir minnini um kæra og trúfasta vin mín Regin Hansen.

**Páll**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

## Tøkk

Tykkum øllum, ið vitjaðu meg á sjúti ára degnum, takki eg hjartaliga.

Tøkk fyri gávur, blómur, telegram og heilsanir um telefonina av ymiskum slag frá bæði nær og fjar.

**Blíðastu heilsanir frá**
**Hensari**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Valdemar Djurhuus**

so brádliga andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prest, sangarar, familju, vinir, kenningar, grannar, starvsfelagar og øllum tykkum, sum mintust pápa og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna*

**Dagny, Karl, Jóhan og Esther**